LM-050/2025

FYLGISKJAL 5

Føroya Blaðútgevarafelag

Tórshavn 8. oktober 2025

Hoyringssvar til uppskot um Løgtingslóg um miðlastuðul

Í uppskotinum til miðlastuðul verður sagt, at »miðlalandslagið skal styrkjast, og at miðlastuðulsskipanin skal stuðla undir hesum«.

Vit fegnast um, at tað – um enn bara partvíst – verður farið aftur til gomlu skipanina, har lønarútreiðslur eru grundarlagið fyri miðlastuðlinum.

Men vit ávara upp á tað harðasta í móti, at landsstýrið ætlar at gera eina skipan við íverksetarastuðli, har ein nýggjur miðil kann fáa 2 mió. kr. um árið í fimm ár – altso 10 milliónir krónur – til at kappast við verandi miðlar.

– Hví sær landsstýrið tað sum sína uppgávu at skapa ein nýggjan miðil fimta hvørt ár, sum skal kappast við teir longu illa sperdu miðlarnar við at geva íverksetarastuðul til ein miðil í eini vinnu, har tað longu er ov nógvir miðlar, sum ikki klára seg?

Tað kundu vit hugsað okkum at vitað – og um landsstýrið hevur eitt endamál við hesum, at kroysta verandi miðlar av marknaðinum.

Um landsstýrið skal liva upp til endamálið at gera umstøðurnar betri, so er hetta beint tað øvugta. Tí landsstýrið eigur als ikki blanda seg uppí, hvørjir aktørar eru á marknaðinum – og so slett ikki at skapa nýggjar aktørar í eini vinnugrein, sum longu hevur fleiri – kanska longu ov nógvar – aktørar. Eisini hevur hetta lógaruppskotið við sær, at miðlar, sum hava gjørt verkætlanir, nú fáa munandi lægri miðlastuðul.

Vit halda, at í staðin fyri at lata íverksetarastuðul til nýggjar miðlar, so kann peningurin fara til prent og útbreiðslustuðul til bløð. Ynskja vit at varðveita føroysk bløð í Føroyum, sum skriva um føroysk viðurskifti, so hevði tað verið gongda leiðin, heldur enn at skapa nakrar alment fíggjaðar netmiðlar, sum fara at hava sum endamál at vinna marknaðarpart frá verandi miðlum.

Orsøkin til at vit halda, at stuðul kann veitast til prent og útbreiðslu av bløðum er, at beinleiðis kostnaðir til eina blaðútgávu er fleirfalt so stórir, sum tað kostar at reka ein netmiðil í ein mánað.

Sosialurin er komin út uttan slit í 98 ár, Dimmalætting er komin út í 148 ár, og Norðlýsið er komið út fleiri tíðarskeið síðani 1915. Hetta eru gamlir og týðandi mentanarberar, ið hava aðrar avbjóðingar, enn smáir talgildir miðlar, sum ofta eru einmansfyritøkur. Ynskja vit í Føroyum at varðveita hesar mentanarberar, so hevði tað verið rættast at brúkt stuðul

til prent og útbreiðslu. Á tann hátt tekur tú ikki frá hinum miðlunum á marknaðinum, men lættir um hjá teimum, sum framvegis vilja geva út bløð.

Vit halda, at tað má vera í stríð við kappingarlógina, at landið ætlar sær at stuðla nýggjum miðlum við íverksetarastuðli á henda hátt í kapping á einum frælsum marknaði, har sjálvstøðugir miðlar hava virkað frítt í so mong ár uttan almenna uppílegging.

Vit hava spurt okkum fyri hjá Kappingaráðnum at vita, hvat tey siga um hesi viðurskifti í sínum hoyringskrivi. Men har fáa vit at vita, at Kappingarráðið als ikki er við sum hoyringspartur í hesum máli. Tað undrar okkum, at Kappingarráðið ikki verður spurt, tá landsstýrið ætlar at gera so týðandi broytingar á einum marknaði. Tí heita vit á landsstýrismannin um at boðsenda Kappingarráðnum at siga sína hugsan um hetta uppskotið, áðrenn tað verður sent Løgtinginum. Ger landsstýrismaðurin ikki tað, so heita vit á Løgtingsins mentanarnevnd um at boðsenda Kappingarráðið, tá nevndin fer at viðgera hetta uppskotið.

Í viðmerkingum til lógaruppskotið stendur í »1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum« at »Nýskipanin við uppskotinum er, at 40% av árligu játtanini verður sett av til at seta á stovn nýggjan tíðindamiðil, og rakstarstuðulin hækkar við 30 prosentstigum, men talan skal vera um *útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu og ikki vanligan rakstur, s.s. olju, el, tryggingar o.a.*, sum ikki kann metast sum útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu, hóast tær eru ein fortreyt fyri einhvørjum arbeiði«.

Hetta er beinleiðis misvísandi at skriva, tí við hesum kann skiljast, at miðlastuðul verður roknaður út frá útreiðslum til olju, el, tryggingar og annað. So er ikki. Miðlastuðul verður bara roknaður út frá lønarútreiðslunum hjá miðlunum. Í galdandi lóg um miðlastuðul stendur um hetta: »Harumframt verða 30% av árligu játtanini á fíggjarlógini latin sum ein eins lutfalslig upphædd í prosentum *av skjalprógvaðum lønarútreiðslum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki*«.

Samanumtikið taka vit undir við, at stuðul til verkætlanir verður avtikin og at parturin til lønarútreiðslur verður hækkaður. Vit mæla staðiliga frá partinum um íverksetarastuðul. Vit mæla til, at pengarnir verða brúktir til útbreiðslustuðul til bløð. Um vilji ikki er til tað, so kunnu pengarnir annaðhvørt sparast á fíggjarlógini ella flytast til puljuna til rakstrarstuðul.

Sagt verður, at endamálið er at gera støðuna betri hjá føroysku miðlunum. Landsstýrismaðurin má tryggja sær, at privatu miðlarnir við hesum ikki fáa minni í stuðuli, enn teir hava fingið frammanund.

Vinaliga
Blaðútgevarafelag Føroyar

Eirikur Lindenskov	*Jonhard Hammer*	*Jóhann Lützen*
Sosialurin	*Dimmalætting*	*Norðlýsið*